**HÚS TIL SØLU**

**Mál nr. 183**
Adr.: Sandur
Stødd á húsum: 91 m² x 2 + loft (eisini fylgir eitt úthús við)
Stødd á grundøki: 2900 m²
Byggiár: 1972
Kostnaður: Kr. 400.000,- ella hægsta boð yvir

**Mál nr. 188**
Adr.: 416 Signabø
Stødd á húsum: 76 m² x 2 (í góðum standi) (Køkur, baðirúm og gólvið í stovuhæddini gjørt av nýggjum)
Stødd á grundøki: 1335 m²
Byggiár: 1942
Kostnaður: kr. 875.000,- ella hægsta boð yvir

**Mál nr. 194**
Adr.: 900 Vágur
Stødd á húsum: 70 m² x 2 + kjallara
Stødd á grundøki: Uml. 150 m²
Byggiár: 1950 (ymiskt nýbygt í 1969)
Kostnaður: Kr. 450.000,- ella hægsta boð yvir

**Mál nr. 201**
Adr.: Traðargøta 26, 100 Tórshavn
Stødd á húsum: Uml. 135 m² x 2
Stødd á grundøki: 904 m²
Byggiár: Uml. 1968
Kostnaður: Kr. 1.800,00 ella hægsta boð yvir

**Mál nr. 204**
Adr.: Onnugøta 3
Stødd á húsum: 178 m² + 59 m²
Stødd á grundøki: 550 m²
Byggiár: Uml. 1986
Kostnaður: Kr. 1.650,00 ella hægsta boð yvir

***Ætla tygum at selja ella keypa hús, vilja vit fegin hjálpa tygum***

**GRUNDØKI og JØRÐ:**

**Mál nr. 609**
Adr.: 440 Haldarsvík
Vídd á jørðini: 2 gyllin + innangarðs
Kostnaður: Kr. 60.000,- ella hægsta boð yvir

**Mál nr. 531**
Adr.: 430 Hvalvík
Vídd á grundøkinum: 763 m² (við ástandandi smáttu)
Kostnaður: Kr. 70.000,- ella hægsta boð yvir

**Mál nr. 538**
Adr.: Sevmýri
Vídd á jarðarøki: 2.972 m²
Kostnaður: Kr. 150.000 ella hægsta boð yvir

**Mál nr. 541**
Adr.: 435 Streymnes
Vídd á jarðarøki: 11.300 m²
Kostnaður: Kr. 200.000 ella hægsta boð yvir

**Mál nr. 542**
Adr.: 494 Innan Glyvur
Vídd á jarðarøki: 610 m²
Kostnaður: Kr. 52.000 ella hægsta boð yvir

**Húsamekling**
**Sp/f Protek, Vaglið, Postsmoga 331, 110 Tórshavn,**
**Tlf. 319321, Fax 319331, E-mail: protek@post.olivant.fo**
**Avgreiðsla kl. 9-12 og 13-16.**
***Keyp og søla av fastari ogn***



Original bosal Útstoyt





ES
**p/f Esmar Simonsen**
**Kambsdalur**
**FR-530 Fuglafjørður**
**Tlf. 444405**
**Fax444629**

**BILLUTIR**
**ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR**
**F.A. BILLUTIR**
tlf. 421605 fax 421666





**IRF**

## Takstir 2001

Frá 1. januar 2001 eru fylgjandi prísir galdandi:

### Burturkast bólkar

**Burturkast sum skal brennast:**

| | Kr/m³ |
|---|---|
| Vanligt burturkast | 160,00 |
| Háorkuburturkast, dekk, trol o.t. | 700,00 |
| Lívrunnið burturkast | 640,00 |

**Burturkast sum skal endurnýtast:**

| | |
|---|---|
| Jarn og metall | 120,00 |
| Háorkuburturkast, dekk, trol o.t. | 120,00 |

**Burturkast sum skal tyrvast:**

| | |
|---|---|
| Asbest, rotviðgjørdur viður o.t. | 180,00 |

Umframt nevndu prísir skal roknast 25% í MVG.

Tað er týdningarmikið, at burturkastið er skilt í einsháttaðar bólkar. Eykagjald verður tikið fyri at skilja burturkast, eftir at tað er komið til IRF.

Nágreiniligur takstfaldari fæst við at venda sær til IRF, tlf. 443343.

**IRF**


**Lastbilur til sølu**





**Merkið: Nissan Eco-T v/krana**
**Árgangur 1997**
**Km. 70.000**
**6 tons totalvekt**
**Prísuppskot kr. 170.000,- v/MVG**

**P/F Meinhardt Arge**



**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*
**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*
**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*
**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**
ADC



**Pløgg**

**TROYGGJA**
til før. mannfólkabúnan til sølu.
Tlf. 441226

**TIL SØLU FYRI HÁLVAN PRÍS**
Gul blusa, svartur, síður niðurdeilur, std. 44, bert brúkt eina ferð. Feilkeyp.
Tlf. 313569, e. kl. 12

**Súkklur**

**SUZUKI GSX 1100**
til sølu.
Tlf. 211235

**MODEM**
US Robotics Sportster flash 56k til sølu fyri kr. 350.
Tlf. 320828

**Teldur**

**PLAYSTATION**
við tveimum vanligum joystikum, eitt memery card og 15 spølum til sølu fyri prísuppskot kr. 3.000,00.
Tlf. 318120 aftaná kl. 18

**FARTELDA**
Toshiba Pentium MMX, 200 MHz, 2 GB harddisk, 32 MB ram, 56K modem og 10 M bit netkort til sølu fyri einans 7.000 kr. Taska fylgir við.
Tlf. 210860

**EITT TELDUSPÆL**
sum eitur The X-Files, til sølu fyri bert 200 kr.
Jákup - 316606

**NINTENDO 64**
við trimum joystickum og einum Super Mario spæli til sølu fyri 700 kr. Lítið brúkt.
Tlf. 311873

**PLAYSTATION**
við tveimum demo-diskum, 2 vanl. joystickum, memory-card, rumble-joystick, Xplorer og 12 spølum bíliga til sølu. samlað ella hvørt sær.
Tlf. 316625, Heini

**Tónleikur**

**SURROUND ANLEGG**
NAD 2700 effekt forst. 150 W, 400W dynamic power, NAD 906 effektforst. 6x30 W eller 3x90W, NAD 414 digital tuner, AMC AV 8IHT forstærker med sourround-dekoder, sælges for 8.500 kr.
Tlf. 319868

**BILHÁTALARAR**
SONY XS 6951, 120w,6x9", til sølu fyri kr. 650.
Tlf. 320828

**BILHÁTALARAR**
JBL TM 420, 80w, 4", til sølu fyri kr. 500.
Tlf. 320828

**BILFORSTERKARI**
Longmill JX-200, 2x100w, til sølu fyri kr. 850.
Tlf. 320828

**Ymiskt**

**NOKIA 3210**
GSM fartelefon til sølu fyri 1000 krónur, 1/2 ára gomul. Ladari og tvey cover fylgja við.
Tlf. 223332

**TIL SØLU**
Te- og døgurðastell, 37 deilir, til sølu f yri 200 kr.
Tlf. 316016

**TIL SØLU**
Philips »personsøger« við vibratori til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 319868

**TELEFONKORT**
Eg havi telefonkort frá uml. 80 londum og býti um við føroysk telefonkort. Eg keypi fegin nýggj, føroyskt, brúkt telefonkort. Góður prísur verður latin.
Tlf. 86150140

**BORTENNISBORÐ**
Stiga borðtennisborð til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 317338

**SNOWBOARD**
Eitt óbrúkt Rossignol 164 cm við bindingum, og eitt Rossignol 149 cm við oxygenebindingum.
Tlf. 220199

**ISOLERAÐ BINGJA**
bíliga til sølu.
Tlf. 217083




Røða hildin 18.12.00 av Jógvani við Keldu á fyrsta fundi hjá býráðnum 2001-2004, tá hann fór frá sum borgarstjóri

# Vit eru tilreiðar at taka við aftur

**Fólkaflokkurin er átøkur Winston Churchill – altíð tøkur, tá eitt hvørt er áfatt.**



Eftir at hava sitið við leiðsluni í Klaksvíkar kommunu í 16 ár av seinastu 20 árunum og samráðingarnar um nýggjan býráðsmeiriluta hava ført til, at vit fingu eina aðra samanseting við Steinbjørn Jacobsen sum borgarstjóra, havi eg sjálvandi staðfest, at vit koma ikki at sita við leiðsluni komandi 4 árini. – Eg fari at ynskja honum tillukku við starvinum.

Hendan setan sum ný byrjar, er 26. setan frá tí at Klaksvíkar Kommuna í 1908 gjørdist kommuna fyri seg saman við Árnafirði, Skálatoftum, Strond, Ánunum og Oyrum.

Steinbjørn Jacobsen verður 24. borgarstjóri í røðini.

Tað er at siga, at Klaksvíkin hevur verið bygd upp av sjáldsama góðum fólki innan vinnulívið, av mentafólki, samstundis sum her hava verið verkafeløg við ábyrgd. – Samstarv saman við áræði og hugsjónum hevur verið lykilin til framgongdina, ið verið hevur síðani 1908.

Símun Hansen tekur til í einari av bókum sínum, at »seinnu árini hevur verið betri samstarv millum vinnulívið og kommununa«. – Tað hevur uttan iva sína orsøk í, at krøvini bæði til kommunur og vinnulívið hava verið týðiliga økt seinastu árini.

Hesi 92 árini síðani kommunan gjørdist kommuna fyri seg, hava mangar upp- og niðurgangstíðir verið, men hvørja ferð hevur fólkið her tikið tess dyggiligari til, tá myrku skýggini hava hómast í havsbrúnni fyri seinni at leggja seg yvir okkara lítla og viðbrekna pláss.

## Ábyrgd at bakka borgarstjóran upp

Lat meg her leggja herðslu á, at tá ein borgarstjóri er valdur, er tað okkara ábyrgd at bakka hann upp. – Borgarstjórin er – sum nevnt undir mongum viðurskiftum – borgarstjóri fyri alt býráðið og ikki bert fyri meirilutan. Tað eigur hann at leggja sær í geyma frá fyrsta degi. – Tí skal hann eisini hava uppbakking frá øllum býráðnum. Hetta kann tykjast eitt sindur mótsigandi, tá tað kanska ofta ikki er semja um hvussu ávís mál skulu loysast. Men hetta er partur av nátúrligari menning.

## Orðið andstøða skal burtur úr býráðspolitikki

Eg fari tí so vítt sum eg sjálvur kann, at gera eina roynd í at avskaffa orðið »andstøða« í býráðspolitikki.

Vit kunnu tosa um at vera í andstøðu til nakað sum vit konsekvent eru ímóti eitt nú, tá Soltzinitsyn var í andstøðu til kommunismuna, ella tey mongu, ið vóru í andstøðu til nasismuna og fasismuna o.s.fr.

Í einum býráði sum í Klaksvík kunnu vit ikki kalla tað »andstøða«.

Vit, sum sita í minniluta eru ikki í andstøðu til meirilutan ella til Klaksvíkina, nei vit eru so sanniliga ein partur sum er við í uppbyggingini av Klaksvíkini og serliga Fólkaflokkurin og eg, sum vóru nógv størstur til hetta valið, og tí hava serliga ábyrgd fyri fólkinum í Klaksvíkar kommunu.

Tí fari eg at heita á allar býráðspolitikarar frá fyrsta fundi, at kalla tað meiri- og minniluti og ikki samgonga og *serliga ikki andstøða*

Vit eru ein skapandi minniluti – kanska ikki altíð so sjónligur – sum onkur hevur tikið til.

Hetta verður so, men vit fingu ein sosialistiskan meiriluta og ein borgarligan minniluta.

Serliga er hetta álagt okkum við teim mongu atkvøðunum Fólkaflokkurin fekk og altíð fær, og at eg einaferð enn kann fegnast um 5. ferð á rað at gerast toppskorari.

Lat tað eisini verða sagt, fyri tað ikki skal vera ósagt, at umframt at hesir sosialistisku flokkar hava ein býráðslim í meiriluta, hava hesir flokkar ein lítlan meiriluta í atkvøðum, nevniliga góðar 100 atkvøður í meiriluta. – So her er sum so einki forgjørt í hesi samanseting.

## Ikki altíð so lætt at skilja

Bæði lands- og kommunupolitikkur kunnu verða eitt sindur torskildir. Tað kunnu vera mál, sum fólk uttanfyri politikkin kundu hugsa sær øðrvísi. Tað er tí ikki altíð so lætt hjá okkum at koma við einum logiskum og greiðum svari.

Tá eg læs bókina hjá fyrrverandi forsætisráðharranum Schlüter »Sikken et liv« – har hann m.a. eisini skrivar um og fegnast um ferðina, tá Klaksvíkar kommuna beyð honum til 95 ára haldið greiðir hann frá, at mitt í 1985 var stjórnin nakað slitin, so teir skiftu fleiri ráðharrar.

Tá ið teir komu út, var sjálvandi ein rúgva av tíðindafólki samlað. Eitt av tíðindafólkunum legði beinanvegin á Thor Petersen sum var heilt nýggjur og setti honum ein sera fløktan spurning, sum Thor Petersen svaraði líka fløkt aftur, og sum hann síðani spurdi tíðindamannin »var det et klart svar«. Tá svaraði Schlüter kvikur til »Det var ikke et klart svart, men et godt svar«. So torført er tað mangan at svara upp á ymist, og tað fer Steinbjørn Jacobsen eisini at merkja.

## Býurin ikki at kenna aftur

Broytingarnar hava verið stórar síðani eg kom inn í kommunustýrið – sum tað tá æt – í 1970, men eg havi ikki ætlað mær at komið inn á alt tað, ið fingist er av skafti hesi mongu árini, men sum fremmanda fólk siga so ofta: »býurin er ikki at kenna aftur«.

Hinvegin má eg siga, at tað er eitt sum ikki er broytt, vit hava eitt gott lið av embætis- og starvsfólki og av fólki í ymisku deildunum uttanfyri sjálvt býráðshúsið, og eg fari at takka teimum hjartaliga fyri at hava staðið við mína lið hesi mongu árini og eisini sagt til, tá tey hava havt aðra meining enn eg. Hjartaliga tøkk fyri tað. Eg fari at sakna tykkum.

Til seinasti fari eg at ynskja býi okkara alt tað besta í framtíðini við Harrans signing. Eg fari eisini – sum eg nevndi á seinasta fundinum nú fráfarandi býráðið hevði – at royna at læra og venja meg til at ynskja meirilutanum alt gott.

Og lat meg til heilt seinast leggja afturat, at stóra fyrimyndin hjá so mongum, Churchill, var altíð til reiðar í torførum tíðum, og soleiðis sum hann kom fram at aftur ferð eftir ferð og seinastu ferð, tá hann á næstan 70 ára aldri saman við USA bjargaði øllum heiminum undan undirgangi. Soleiðis eri eg – um lív og heilsa er – og Fólkaflokkurin til reiðar, at taka við ábyrgd aftur, tá borgarar okkara í Klaksvíkar Kommunu hava brúk fyri okkum.

Hesi mongu árini hava bæði verið spennandi og mennandi, men tey hava eisini slitið.

## HEILSANIR



**Góði Fróði!**
Tillukku við 18 ára føðingardegnum. P.S. Her eru tit fittir.
**Heilsan vit**



**Góðu Joan og Rannvá**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 28. og 30. desember.
**Heilsan omma**



**Góði kjeri Haftór!**
Tillukku við 12 ára degnum 28., tú ert so fittur. Tú sært so errin út her.
**Heilsan frá Abbanon, ommune og Niels**


**Heilsanir** 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á middegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:..........................................................................
.......................................................................................
.......................................................................................
.......................................................................................
.......................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..............................................................................
Bústaður: .........................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**